# Fosturtøka

**Reimund Langgaard**
*valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Fosturtøka er eitt sera eldfimt evni, sum nógv hava sína greiðu meining um. Eg gangi fast á møti og trúgvi at Bíblian er Guds sanna orð, so lætt er at gita at eg eri ímóti fríari fosturtøku - eins og nógvir av mínum líkum. Tó hevur tað undrað meg nógv, at fosturtøka er blivið eitt stríð millum "fanatisk trúgvandi" og "restina".

Um fostrið er eitt menniskja, so burdu øll verið ímóti - aktiv sum minni aktiv kristin - og er fostrið ein slímklumpur, ja men so er einki at kjakast um. Tí so skuldi fosturtøka sjálvsagt verið loyvd. Ja tað skuldi verið ein rættur hjá einihvørji kvinnu.

Tískil er spurningurin í mínari verð, um fostrið er eitt menniskja ella um tað er ein slímklumpur. Ella sagt uppá ein annan máta, so er spurningurin nær barnið gerst menniskja - við giting ella føðing. Ella kanska tá ið tað er 12 vikur gamalt, hóast tað í mínari verð virkar púra ólogiskt.

Eg eri ikki serfrøðingur innan læknavísindi, og tí kanska ikki tann rætti at taka støðu til hvat eitt fostur er, men vil her endurgeva nøkur læknavísundalig fakta, sum kunna hjálpa til at fáa tikið hesa altavgerandi støðuna.

Hjartað hjá fostrinum byrjar at sláa, tá ið tað er millum 18-25 dagar gamalt (um 3 vikur).

Heilin hjá tí byrjar at virka, tá ið tað er um 40 dagar gamalt (um 6 vikur).

Tá fostrið er 12 vikur gamalt er tað 9cm langt. Hevur eygu, oyru, nøs, munn, armar, bein, fingrar og tær - ja tað hevur enntá fingið negl.

Móður Teresa, sum flestu okkara helst høvdu sera stóra virðing fyri, brúkti nógva orku fyri at verja tey óføddu (børnini ella slímklumparnir). Hon segði eisini "if you do not want your unborn child, bring it to us and we will raise it" (um tú ikki ynskir títt ófødda barn, so gev okkum tað og vit vilja taka okkum av tí). Hesi boðini hevur hon givið til nógv sjúkrahús, stovnar og fólk runt um allan heim, og hevur hennara hjálparfelagsskapur bjarga meir enn 3.000 børnum í Calcutta, India á henda hátt - umframt øll tey, sum eru bjargað í øllum hinum londinum, har hennara systrar eru virknar. Tær geva síðan hesi børnini víðari til familjur, har børnini eru ynskt. Tað týdningarmesta er at børnini fáa lívið - gávuna, sum flest okkara eru glað fyri og halda fast í, men harumframt eru tær eisini við til at breiða gleði í nógvar barnleysar familjur.

Móður Teresa segði eisini: "Um fólk velja at hava samlegu, so skulu tey vita, at tað er ein møguleiki fyri at eitt barn verður føddd vegna hetta. Vaksin eru vaksin, tí at tey vita um møguleikan fyri avleiðingar av teirra handlingum. Tey kunna rokna út vinning og skaða og síðan handla eftir normum og reglum. Vaksin eru før fyri at taka hesa ábyrgdina, av tí at tey kunna halda eftir, stýra og útseta... Um eg veit at eitt flogfar fer at detta niður, so fari eg ikki umborð. Um eg veit at veturin verður kaldur, so keypi eg heit klæði, og um eg veit at vegurin er hálur, so koyri eg spakuliga. Í hesum førunum virkar tað so sjálvsagt. Men tá ið talan er um okkara kynslív, so føla vit fullkomna fríheit og ongin avmarking skal stríða ímóti fríheitini" (leysliga umsett).

Eg eri persónliga sannførdur um, at fostur eru menniskju frá tí tey eru gitin, og at eisini tey eiga rættin til lív. Eg takki Guði fyri, at hann skapti meg í móðurlívi, og mammu míni fyri, at hon ikki drap meg har, men gekk við mær í 9 mánaðir og síðan setti meg inn í heimin.

Eg vil enda við at endurgeva Kim Larsen, tá ið hann syngur: "Det er godt, at vi blev født før aborten den blev fri."

# Kallsberg og Hoydal høvdu yvirforbrúk

**Annfinn Brekkstein**
*valevni sambandsflokksins í Suðurstreymoy*



Í svárari fíggjarneyð ætlaði fullveldissamgongan at leggja enn meira byrðar og skattir á fólki. Felagsnevnarin hevur verið vánalig fíggjarlig stýring við galoperandi útreiðslum á almenna sektorin og manglandi inntøkum á fíggjarløgtingslógini.

Løgmansskrivstovan hevði fyri neyðini at biðja tingið um eina eykajáttan upp á uml. 700 tús. kr., tí tey høvdu staðfest eina meirnýtslu. Tá Løgmaður ikki kann stýrað sínum egnu fyrisiting, hvussu kann hann so stýrað landinum? Eitt sera eitt vánaligt signal at senda út.

Men ikki bara Kalsberg hevði yvirforbrúk, men so sannilga eisini Høgni Hoydal mátti biðja tingið um eina eykajáttan. Hesin rættvísi leiðarin sum ongantíð ger nakað galið, sigur hann, hevði eisini fyri neyðini at biðið tingið um meir pening. Biðið varð um eykajáttan áljóðandi 627 tús. Kr. Hesin peningur varð brúktur til, m. a., at stuðla einum filmi; - um sjálvan varaløgmann á fullveldisleið. Eisini hetta skal skattgjaldarin rinda fyri.

Eisini her eru vánalig signal sum fullveldisleiðararnir senda út. Felagsnevnarin er at teir hava ikki nakra stýring á teirra egnu fyrisitng og so bjóða teir seg fram at stýra landinum.

Hesin órøkinskapur má steðgast. Sambandsflokkurin er einasta alternativ til eina stabila fíggjarstýring, vit eru klárir at taka við landsins leiðslu og tryggja tína framtíð.

# Frælsi fyri meg sum velji Sambandsflokkin

**Kaj Leo Johannesen**
*valevni Sambandsfloksins í Surðurstreymoy*



Henda spurningin skulu vit taka støðu til komandi Løgtingsval, tað kemur at ávirka, í einum samfelagi, sum hevur sjógvin á at líta, tað er eingin ivi, at komandi Løgtingsval verður ein fólkaatkvøða um Loysing frá Danmark við verri umstøðum, ella Samband við Danmark við tryggari umstøðum.

Eg fari við nøkrum reglum at siga hvat undiritaði hugsar um, ella meinar við, tá frælsishugtøk verða nevnd millum manna, og hvat heilt konkret "frælsið" hevur at siga, lata meg sláa fast beinaveg.

Eg eri ikki ein av teimum sum haldi, at tey sum ikki hava somu meining sum eg, ikki skilja hvat frælsið veruliga merkir.

Persónligt frælsi fyri meg, er at búgva undir taki, uttan at fara svangur til songar.

Persónligt frælsi fyri meg er at verða raskur, og at kunna stríðast fyri landi og fólki.

Persónligt frælsi fyri meg er at síggja børn míni vaksa upp, uttan hóttanir um yvirgang og harðskap.

Persónligt frælsi fyri meg er at taka ábyrgd av egnum gerðum, uttan mun til hvat onnur siga.

Persónligt frælsi fyri meg er at taka ábyrgd av skeivum og røttum avgerðum

Persónligt frælsi fyri meg er at ganga tryggur úti, uttan at verða álopin.

Persónligt frælsi fyri meg er at anda reina luft niður í lungini

Persónligt frælsi fyri meg er at koma undir læknahond, um eg gerðist sjúkur

Persónligt frælsi fyri meg er at vita at okkara børn, hava rættindi at mennast í lívinum.

Persónligt frælsi fyri meg er at sleppa at virða onnur menniskju uttan at verða dømdur ella fordømdur av mínum landsmonnum.

Tá eg nevni meg sjálvan, er tað tí, at tað sum eg skilji við frælsi, helst ikki er tað sama, sum onnur halda verða frælsi.

Eg vil at enda takka fyri, at tað er víst mær tað álit at koma uppá Sambandslistan til komandi Løgtingsval, og fari eg at berjast fyri Føroyar, soleiðis at tað ikki kemur uppá tal at hótta vælferðina hjá okkara stoltu tjóð.

Eitt gott val

# Matrikullóggávuna verður dagførd

**Heðin Dánialsson Poulsen**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy*
*www.hedindp.com*



"Óðalsjørðin og seyðahald sum ítriv verða raðfest hægri enn higartil". Brot úr valskránni hjá Folkaflokkinum.

Í alt ov langa tíð hava flokkarnir givið óðalsjørðini ov lítlan ans, nú hevur fólkaflokkurin fingið óðalsjørðina á breddan í síni valskrá, og nógv er at gera innan øki, millum annað viðvíkjandi matrikullóggávuni.

Matrikullóggávan er alt ov tvørlig at umsita og láturliga dýr fyri brúkaran. Matrikullógávan verður broytt tá fólkaflokkurin eftir næsta val aftur kemur í landsstýrið.

Sjálvandi er tað ikki rætt, at myndugleikin skal seta seg ímóti um svágur mín og eg ynskja at býta felags uttangarðsjørðina hjá okkum í tvey sjálvstøðug matrikulnummur, ella um vit ynskja at selja tað innangarðs til ein áhugaðan keypara. Hvussu kunnu vit verja eina rættarstøðu, har mest sum alt valdið at ráða yvir privatari ognarjørð liggur hjá einum myndugleika, tá vit samstundis siga at ognarrætturin er friðhalgaður?

Sjónarmiðið fyri at hava eina stranga matrikullóggávu er, at eingin ynskir tað ólukkuligu støðu, ið vit høvdu áðrenn jørðin var samlað, tá jørðin bleiv petta sundur í ónýtuligar smáar lutir. Hesa støðu vil eingin hava aftur, tað sum vit vilja er eina meira lagaliga lóggávu, ið loyvir at býta innangarðs frá uttangarðs og sum loyvir innangarðsjørð at verða býtt sundur í hóskandi eindir, eitt nú til minimum 5000 $m^2$.

Áðrenn val varð útskrivað, avgjørdi landsstýrismaðurin í búnaðarmálum, at øll jarðarlóggávan skuldi endurskoðast, harímillum skuldi matrikullógávan dagførast, og tað er bara at vóna, at komandi landsstýrismaðurin fer at fylgja áðurnevndu avgerð.

Broytingar eru á veg og tað er at frøðast um, serliga er at frøðast um orðini í valskránni hjá fólkaflokkinum um, at "Óðalsjørðin og seyðahald sum ítriv verða raðfest hægri enn higartil".

Við ávirkan fólkaflokksins heldur arbeiðið fram at dagføra jarðarlóggávuna, harímillum matrikullóggávuna, ið vit harðliga hava brúk fyri, til tess at forða fyri at alt tað sum eitur frítiðarjarðarbrúk ikki einans gerst eitt minni frá einari farnari tíð.



# Svart samband ella fræls framtíð?

**Høgni Hoydal**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy*



Sambandsleiðin

Ímynda tær eina framtíð, har fullveldisgongdin støðgar upp í Føroyum.

Politikkurin fer at snúgva seg um grønar keks og bomm. Um at lova studning til vinnuna og skattalættar til tey ríkastu. Hetta fer við vissu at leiða Føroyar í fíggjarligt óføri og aftur í fortíðina til biddaragongd á Christiansborg.

Føroyar verða endaliga limaðar inn í danska ríkið. Danmark fer undir eina ES-grundlóg. Okkara uttanríkismál, verjumál, rættarmál og annað, verða flutt til Brússel at umsita.

Føroyar gerast ein dupultur útjaðari. Ein landslutur í Danmark og ein enn minni lutur í ES.

Sambandsflokkurin hevur longu boðað frá, at hetta verður leiðin, um hann vinnur valið. Og ger hann tað, dregur hann allar hinar flokkarnar, ið eru spjaddir millum sjálvstýri og samband, við sær.

**Fullveldisleiðin**

Ímynda tær hinumegin eina framtíð, har vit halda fram á fullveldisleiðini.

Vit leggja føroysku grundlógina til viðgerðar hjá øllum føroyingum. Har kunnu vit sjálvi staðfesta rættindini hjá føroysku tjóðini. Har kunnu vit áseta, hvørji rættindi og hvørjar skyldur, vit øll skulu hava í Føroyum.

Vit halda fólkaatkvøðu um grundlógina. Tá hevur føroyska fólkið sjálvt gjørt av, hvussu okkara samfelag skal skipast. Tá kann ongin donsk stjórn seta spurnartekin við okkara rættindi uttan at seta seg beinleiðis ímóti fólkaræðinum.

Vit fáa øll mál á føroyskar hendur, sum í dag verða umsitin í Danmark.

Vit halda fast um ein sjálvberandi búskap og eina studningsfría vinnu.

Vit halda fast um tey sosialu frambrotini.

Vit halda fast um ta miðvísu útbyggingina av okkara samfelag.

Vit halda fast um at styrkja ta skapandi mentanina í Føroyum og at menna útbúgving og gransking.

Vit byggja eitt sterkt samstarv við okkara grannatjóðir í Norðuratlantshavi. Vit skapa eitt slag av "OPEC" fyri fiskivinnu í Norðuratlantshavi.

Vit seta okkum í miðjuna heldur enn at enda sum útjaðari, har onnur seta allar treytir.

Okkara vinnulív, okkara mentanarlív og okkara ungdómur kann traðka út í heim á jøvnum føti.

Føroyar kunnu vaksa, mennast og búnast.

**Tú eigur avgerðina**

Svart samband ella fræls framtíð?

Bara ein sterkur Tjóðveldisflokkur kann halda fast um fullveldisleiðina.

Avgerðin liggur í tínum hondum 20. januar 2004.

# Eg vil virka fyri...

**Rúna Sivertsen**
*Valevni Fólkafloksins í Norðoyggjum*
*runas@post.olivant.fo*



Tað skal loysa seg betur at arbeiða og meiri skal verða eftir av lønini

At stuðulin fyri barnaansing skal fylgja barninum, so mammur, sum ynskja at vera heima, fáa stuðulin útgoldnan

Pensjónirnar skulu hækka, og eldri skulu kunnu búgva heima sum longst

Gomul, sum ikki orka at røkja egin hús, skulu hava aðrar bústaðarmøguleikar

Tey, ið bera brek skulu eftir førimuni hava frælsi til sjálvi at leggja egin viðurskifti til rættis - og hava umstøður, sum ger tey før fyri at hava arbeiði og trívast

Fólk við breki skulu hava møguleika til útbúgving

Tunnils- og vegasambandið til bygdirnar norðanfyri skal bøtast, so farleiðin gerst trygg. Somuleiðis skal ferðasambandið til útoyggjarnar gerast betur

Akutti tørvurin um Leirvíksfjørð skal loystast, so vinnan kann virka uttan forðingar

Klaksvíkar Sjúkrahús skal útbyggjast og gerast til reiðar til øktu tilgongdina av sjúklingum, sum verður, tá koyrandi er til meginøkið Sjúkrahúsið skal viðurkennast sum sersjúkrahús innan liðútskiftingar

Fiskiloyvini skulu vera ogn hjá fiskimanninum og smábátar skulu kunna fiska frítt

Trygdin á sjógvi og landi skal økjast - Nullhugsjónin um, at vit ongan skulu missa í ferðsluni - skal eisini galda á sjónum

Lóggávuarbeiðið á tingi skal vera í samsvar við bíbilsku meginreglurnar

Fólkaflokkurin vil næstu 4 árini veita tær og tínum bestu umstøður at skapa eina trygga tilveru.

Far á val 20. januar og set kross við lista A

# Vel klókt 20. januar, vel realismu fram um fantasi!

**Erikka Elttør**
*valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Kæri veljari! Ynskja tygum at Føroyar aftur fáa eina stjórn og eitt ting, sum riggar, og sum nýtir orku og pening til annað enn at keglast og fyrigykla fólkinum eina framtíð, ið ikki hevur hald í veruleikanum, so kann eg vissa tygum um, at rættasta loysnin er at velja Sambandsflokkin 20. januar.

Tá tygum so hava valt klókt, fer Sambandsflokkurin eisini at virka fyri at fammiljan, sum er sjálv hjarnan í samfelagnum, fær so góðar fortreytir og so góðar umstøður at virka undir, sum til ber. Millum annað skal barsilsskipanin bøtast, soleiðis at hon samsvarðar við endamálið, sum er, at geva foreldrum høvi til at verða við hús fyrsta árið í lívinum hjá teimum nýføddu.

Sum lið í familjupolitikki sínum, ynskir Sambandsflokkurin at varðverita gamlan føroyska sið, sum er, at øll ið ynskja tað, fáa høvið og umstøður til at seta føtur undir egið borð, og útvega sær egin hús ella egna íbúð. Tí er tað eisini neyðugt, at rentustuðulin verður varðveittur á sama støði, sum nú.

Aðalendamálið hjá Sambandsflokkinum er at tryggja grundarsteinin undir føroyska samfelagnum, føroyska húski, føroysku familjuna!

# Frá heimahjálp til onga hjálp

**Eddie Joensen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Norðurstreymoy*



Fyri fyrstu ferð síðani heimahjálparaskipanin varð innførd av Javnaðarflokkinum í 1973, hava vit fingið bíðilistar til heimahjálp í Føroyum.

Heimahjálparaskipanin hevur riggað væl í 30 ár. Sjálvt í ringastu kreppuárum syrgdi Javnaðarflokkurin fyri, at heimahjálp var ein rættur til tey, ið hava lagt lunnar undir hetta land. Í allarbestu tíðum hava vit nú fingið bíðilistar til heimahjálp av berari vanstýring.

Hetta líkist snøgt sagt ongum, og serliga, tá hugsað verður um, at vit hava havt ein fíggjarmálaráðharra, ið hevur latið umsitingarútreiðslurnar í miðfyristingini vaksið við 220 milliónum, samstundis sum man hevur spart í almennu tænastunum, sum til dømis í heimahjálpini.

Okkurt tjóðveldisvalevni í Norðstreymoy tosar um at seta kós. Nú hava vit sæð kósina hjá Tjóðveldisflokkinum á hesum økinum, og er hon so skeiv, sum hon kann verða. Vit hava eisini sæð hvussu byrðarnar hava verið lagdar á tey gomlu og barnafamiljur, meðan umsitingin bert er bólgnað.

Javnaðarflokkurin tryggjar, nú sum altíð, at heimahjálp er ein rættur. Skal sparast, so má tað verða aðrastaðni. Tað hava vit klárað fyrr, og standa klarir at taka við aftur fyri at vísa, hvar skápið skal standa. Heta tryggjar ein atkvøða til lista C

# Fólkafloksveljarar í tvístøðu

**Høgni Mikkelsen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



20. januar verður ein trupul dagur hjá fólkaflóksveljarum. Tí hvønn vong í flokkinum skulu tey velja? Skulu tey velja tann borgarliga-loysingarvongin ella skulu tey velja tann borgarliga-sambandsvongin?

Tit fólkaflóksveljarar ið ikki taka undir við loysingarpolitikkinum eru absolut í einari tvístøðu tí, at tit vita ikki hvat tit velja!

Sjálvandi siga tit, at tit hoyra til tann borgarliga-sambandsvongin, men hvussu kunnu tit verða vís í, at atkvøða tykkara ikki verður brúkt til tann borgarliga-loysingarvongin og harvið eisini stuðla Tjóveldisflokkinum???

Tí vil eg heita á tykkum um at velja Sambandsflokkin, tí har er eingin tvístøða!!!

Sjálvur eri eg ein borgarligur sambandsmaður.